# Brúðarmyndir



*Vit ynskja hjartaliga at takka øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara 3. des. 2005.*
***Blíðar heilsanir Fía og Karl Magni Hammer***



*Hjartaliga takka vit øllum, sum gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara 8. apríl 2006. Takk fyri heilsanir, blómur og gávur.*
***Kærar heilsanir Siri og Tue Falkenstrøm***



*Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum gleddu okkum við gávum, blómum og telefonuppringingum á diamantbrúdleypsdegi okkara 14. jan. 2006. Ein serstøk tøkk til tykkum, sum komu úr Føroyum at halda dagin saman við okkum.*
***Astrid og Johannes Álvheygg***

*Hjartans tøkk vit vilja veita*
*til tykkum øll sum høvdu leitað*
*at heilsa uppá okkum Dýra Bíðudag*
*Og vóru tá í veitslulag.*
*Hendan stóra dag at frøast saman*
*Ein hátíðardagur í gleði og gaman*
*Eisini tøkk til tykkum sum hjálptu til*
*Og hildu á øllum sera væl skil*
*Guð signi tykkum øll somul*
*Bæði ung og gomul*
*Tykkum øllum vit takka fyri*
***Miriann og Jógvan Dam***
***Í Kollafirði***



*Vit og børn okkara takka hjartaliga øllum tykkum sum gjørdu silvurbrúdleypsdag okkara tann 7. jan. 2006 ógloymandi. Takk fyri gávur, blómur, telegrammir, uppringingar og alla ta hjálp, sum vit fingu bæði áðrenn og aftaná. Takk fyri sangirnar, sum vit blivu vakt við á sjálvum degnum. Takk til tykkum, sum komu heim úr Danmark at halda dagin saman við okkum. Stóra tøkk øll somul.*
***Tær bestu heilsanir frá Anitu og Tummas Paula Olsen Súna, Henny og Martin Olsen***




